Altjóða giktadagur í Norðurlandahúsinum

12. oktober verður Altjóða giktadagurin hildin í Norðurlandahúsinum. Giktafelagið hevur valt at lata Giktadagin í ár verða dag teirra, sum hava Fibromyalgi

GIKT
Tíðindaskriv

Fibromyalgi er sjúka, ið ikki er løtt at staðfesta, tað setur tí serlig krøv til serkunnleikan, so fyri hesar sjúklingar í Føroyum er tað ein stórur vansi, at ongin serlækni er á hesum økið herheima.

Fibromyalgibólkurin sum er undirbólkur í Giktafelag Føroya, hevur fingið norska serfrøðingin í fibromyalgi, Karin Øien Forseth, at koma hendavegin at halda fyrilestur um hesa giktasjúkuna.

Karin Øien Forseth er 53 ára gomul. Hon hevur arbeitt sum sosionomurí 5 ár, og varð liðug sum lækni í 1986. Hon fekk doktoraheitið við ritgerð, ið kallast: »Vøddapína og pína í beinagrind og fibromyalgi - útbreiðsla, títtleiki, søguliga gongdin og fyriboðan.« (Musculoskeletal pain and fibromyalgia: Prevalence, incidence, natural history and predictors.)

Hon hevur arbeitt á norska Ríkissjúkrahúsinum, men arbeiðir nú á giktadeildini á sjúkrahúsinum Betanien í Skien í Noregi.

Øll, sum hava áhuga í Fibromyalgi eru vælkomin til fyrilesturin í Norðurlandahúsið henda dagin 12.okt 2002. Byrjað verður kl 14.00, har møguleiki verður at keypa sær ein drekkamunn og tosa saman, áðrenn fyrilesturin .

Kl 15.00 fer Karin Øien Fortseth at halda sjálvan fyrilesturin, og eftir fyrilesturin er møguleiki at seta fram spurningar til Karin Ø. Forseth. Orðstýrari verður næstformaðurin í Giktafelagnum, Anna Petersen.

Um kvøldið verður samkoma í MBF húsinum, har ábit og undirhald verður á skránni.

Allir limir í Giktafelagnum kunnu vera við í samkomini um kvøldið.

Kostnaðurin fyri tiltakið í MBF húsinum er Kr. 150,-. Tilmelding fer fram til 8.okt.02 á tlf 310237, 321309 ella 21 43 79.

Fibromyalgibólkurin vónar at síggja nógv fólk í Norðurlandahúsinum leygardagin 12.oktobur, tí nógv viðgerðarfólk bæði kommunulæknar, sjúkrasystrar, fysioterapeutar, ergoterapeutar og socialráðgevarar hava her møguleika at møta serkunnleikanum, fáa meira at vita um fibromyalgi, og sostatt er møguleiki at fáa ivaspurningum svaraðum.

Gikt er nógvar ymiskar sjúkur, tær mest kendu eru eitt nú Slitgikt, Liðagikt, Urinsýrugikt og Bechterew.

Aðrar giktsjúkur, sum ikki eru so kendar, eru til dømis, Fibromyalgi , SLE, Sjøgren syndrom, og Reiters.

Ìtróttarskaðar og ryggsjúkur/skaðar vera eisini bólkaðar undir heitinum giktsjúkur, umframt einar 200 aðrar sjúkur.

Torgdagur í SMS

Mánadagin 14. oktober verður Torgdagur í SMS. Tað er Apotekið, Giktafelag Føroya, Hjálpartólamiðstøðin og handilin Ergo og Hjálpartól, sum saman standa fyri torgdegnum. Endamálið við degnum er at lýsa giktasjúkurnar, eitt nú hvør kunning er at fáa frá Giktafelaganum.

Fyribyrging og hjálp við hjálpartólum er umráðandi leiklutur í lívinum hjá tí giktrakta. Orsøkin til at vit hava 2 umboð fyri hjálpartólaøkið er, at hjálpartólamiðstøðin er tann almenni parturin, har ein søkir um hjálpartól og fær tólini eftir umsókn. Sostatt eru hesi tólini uttan kostnað.

Handilin Ergo og hjálpartól er ein privatur handil sum selur hjálpartól bæði til almenn støð, men eisini til privatar persónar. Nógv fólk, sum eru rakt av gikt velja at keypa sær sítt egna hjálpartól eitt nú smától til køksarbeiði,og skulu tí hava henda møguleikan.

Giktaár er á Apotekunum í Norðanlondum . Apotekið í Føroyum hevur á henda hátt valt at bjóða giktafelagnum við á Torgið hendan dagin.

Apotekið hevur í ár haft ymiskt frammi um gikt í , og teirra leilutur á Torginum henda dagin er at kunna um giktaheilivág og hvussu ein best nýtir henda heilivág og hvørjum Apotekið kann hjálpa tí Giktrakta við.

Giktafelag Føroya vónar, at nógv fólk vitja okkum á Torginum í SMS hendan dagin.

Konsert í Gøtu Kirkju

Ein floytubólkur og ein klarinettbólkur frá Musikkskúlanum hava konsert í Gøtu Kirkju í kvøld

KONSERT
Tíðindaskriv

Í kvøld, hóskvøldið 10. oktober kl.19.30, er konsert í Gøtu Kirkju. Tað er Musikkskúlin, sum skipar fyri, lærarnir Andrea Heindriksdóttir og Peder Riis-Jensen møta um við hvør sínum bólki - ein floytubólkur og Føroya Klarinettorkestur. Tey hava eisini bjóða Leirvíkar Gentukóri við á konsertina, leiðari teirra er Dánjal Eysturstein.

Floytubólkurin spælir m. a tónleik eftir Fr. Kuhlau og G. F. Händel, Leirvíkar Gentukór syngur m.a. 2 løg, sum leiðarin hevur útsett og Føroya Klarinettorkestur spælir m.a Ave Verum Corpus hjá Mozart og eina útseting hjá Bjarna Restorff av bøhmiska sálmalagnum »Upp alt, ið Harrin hevur gjørt«.

Skráin er henda:

Floytubólkur:
J. J. Quantz (1697-1773): Preludio og Arie úr sonatu, opus 3 nr. 6 Fr. Kuhlau (1786-1832): Adagio úr opus 81 nr. 1 G. F. Händel (1685-1759): Gavotte Fr. Kuhlau (1786-1832): Rondo úr duet, opus 1 J. Hook (1748-1827): Allegretto og Andante úr sonatu nr. 1

Leirvíkar Gentukór:
Afrikanskt fólkalag, arr. John Højbye: Siyahambe Negro Spiritual, arr. Poul Schønneman: Do don't touch Dona nobis pacem, ókendur uppruni Gamalt føroyskt sálmalag, arr. Dánjal Eysturstein: Nu rinder solen op Knút Olsen, arr. Dánjal Eysturstein: Havið sang um Føroyar

Føroya Klarinettorkestur:
Bøhmen (1549), arr. Bjarni Restorff: Upp, alt ið Harrin hevur gjørt W. A. Mozart(1756-1791), arr. D. Dorff: Ave Verum Corpus N. A. Zingarelli (1752-1837), arr. D. V. Joseph: Motet, 1. Andante e Sostenuto, 2. Allegro Giusto

Ken Denning í Listaskálanum

Leygardagin letur upp framsýning við listarverkum hjá Ken Denning í Listaskálanum í Havn

LISTAFRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Ken Denning, sum er føddur í 1957 í Sønderborg í Danmark, hevur mangan vitjað í Føroyum. Tey seinnu árini hevur hann fleiri skifti arbeitt í Grafiska Verkstaðnum í Listaskálanum.

Hann nýtir manga grafiska tøkni: silkiprent, steinprent, kaldanál, træskurð, fotogravuru o.a.

Mangar myndir eru samansetingar av silkiprenti og oljumáling. Hetta úrval av myndum hansara, ið hava sera týðiligan dám av føroyskari náttúru, verður sýnt fram í Richard-Haizmann-Museum, Niebull, Týsklandi, Galleri Den Gyldne Løve, Varnæs, Danmark og Listasavni Føroya.

– Svartbrúnir, bleikir jarpir tónar og gráir mana fram eitt hugans rúm.

Á gyltum klangbotni kaffibrúnt, brent og óbrent umbra.

Terra di Siena og alskyns okkur.

Ein fyrivarin kaldligur litdámur.

Sum í spákonunnar kaffigruggi.

Sum í einum fúnaðum filmi, har okkultar kreftir búleikast í grábrúnari skýming.

Sum í gomlum ljósmyndum, har minnini eru stirðnað í brúnum dreymalýsi…

heilsar Listasavn Føroya í tíðindaskrivi.

Norðurlendskt umbýti av starvsfólkum

Norðurlendska tænastumannaumbýtisskipanin ger tað møguligt hjá starvsfólki í landsfyrisitingini at fara til eitt av norðurlondunum at arbeiða í eina tíð. Stuðul verður veittur til at gjalda ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá luttakara.

Skipananin hevur verið í gildi síðan 1979 og endamálið er at fremja norðurlendskt samstarv. Endamálið er somuleiðis at geva luttakarunum kunnleika til fyrisiting og lóggávu o.a. í hinum norðurlondunum.

Tað er ikki neyðugt at luttakari býtir um pláss við ein starvsfelaga í einum øðrum norðurlandi, tó er onki, sum forðar fyri hesum.

Í 2003 hava Føroyar fingið tillutað kr. 70.000,- at nýta til hesa skipan.

Skipanin virkar soleiðis

Skipanin fevnir um bæði tænastu- og starvsmenn. Uppihaldið kann vara millum 1 og 8 mánaðir í einum kalendaraári.

Stuðulin er í 2003 kr. 7.000,- um mánaðin umframt ferðaútreiðslur aftur og fram. Endurgjald verður einans latið fyri ferðing á bíligasta hátt.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at viðkomandi fær frí við løn úr starvi sínum. Tíðin verður tald við í lønar- og eftirlønaraldrinum.

Tey, sum vilja nýta skipanina, mugu sjálvi gera avtalu við stovn í øðrum norðurlandi.

Luttakari skal senda Løgmansskrivstovuni eina frágreiðing um uppihaldið, áðrenn 3 mánaðir eru farnir eftir heimkomu. Heruppií ein stuttan samandrátt á skandinaviskum máli t.d. á donskum, sum Løgmansskrivstovan sendir avgreiðsluskrivstovuni hjá Norðurlandaráðharraráðnum.

Umsóknir

Umsóknir um stuðul skulu sendast Løgmansskrivstovuni ígjøgnum stýrið/leiðsluna á stovninum. Umsóknin skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

1. Navn á umsøkjara, føðingardagur og bústaður
2. Starvsheiti, starvsaldur og starvsstaður
3. Arbeiðsuppgávur
4. Navn og bústaður á stovni, avtala er gjørd við og tíðarskeið
5. Upphæddin, sum søkt verður um - tíðarskeið og ferðaútreiðslur

Upplýsast skal, um umsøkjari hevur søkt um annan stuðul.

Umsóknin skal innihalda ummæli frá stovninum, har stovnurin sigur frá, um viðkomandi kann fáa tænastufrí við løn.

Umsóknarfreistin er 06. januar 2003. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting verða bert viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Nærri upplýsingar um skipanina fáast við at venda sær til Løgmansskrivstovuna - nýskipanardeildina og fáast eisini við at fara á heimasíðuna hjá Nordisk Ministerråd: www.norden.org og hyggja undir Støtteordninger og Nordisk utbytestjänstgöring.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsformaður í Tórshavn

Til vega- og kloakkdeildina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir arbeiðsformanni at standa fyri viðlíkahaldsarbeiði í Tórshavn.

Kommunan bjóðar eitt spennandi sjálvstøðugt starv, ið er bæði fakliga og persónliga mennandi. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag við ískoyti.

Persónligir eginleikar
Umsøkjarin skal umframt at arbeiða sjálvstøðugt taka skjótar og rættar avgerðir og vera fyrikomandi. Umráðandi er, at umsøkjarin virkar í góðum samstarvi við starvsfelagarnar.

Meiri fæst at vita
um starvið við at seta seg í samband við Boða Haraldsen, býarverkfrøðing ella J. Sørus Hansen verkfrøðing, á tlf. 315160

Umsókn
við viðmælum og neyðugum upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. oktober 2002. Viðmerkjast skal á brævbjálvan "Arbeiðsformaður Tórshavn"

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsformaður í Kollafirði

Til vega- og kloakkdeildina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir arbeiðsformanni at standa fyri viðlíkahaldsarbeiði í Kollafirði.

Kommunan bjóðar eitt spennandi sjálvstøðugt starv, ið er bæði fakliga og persónliga mennandi. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag við ískoyti.

Persónligir eginleikar
Umsøkjarin skal umframt at arbeiða sjálvstøðugt taka skjótar og rættar avgerðir og vera fyrikomandi. Umráðandi er, at umsøkjarin virkar í góðum samstarvi við starvsfelagarnar.

Meiri fæst at vita
um starvið við at seta seg í samband við Boða Haraldsen, býarverkfrøðing ella J. Sørus Hansen verkfrøðing, á tlf. 315160

Umsókn
við viðmælum og neyðugum upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. oktober 2002. Viðmerkjast skal á brævbjálvan "Arbeiðsformaður Kollafjørður"

SNARSKIVAN

Mentamálaráðið

Roknskaparfólk /Bókhaldari

Starvið
Í sambandi við at eitt av okkara starvsfólkum fer í annað starv, er eitt nýskipað starv leyst at søkja sum bókhaldari í Mentamálaráðnum.
Starvið er skipað sum sjálvstøðugt starv í fyrisitingardeildini.

Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:
- Kontering, bókhald, fíggjarstýring og eftirlit við rakstrarstøðum
- At nýta teir fíggjarstýringsmøguleikar, ið finnast í Búskaparskipan Landsins og menna slík amboð
- Luttaka í gerð av sundurgreiningum og langtíðarætlanum
- Málsviðgerð

Førleikakrøv
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava
- Eina fyri starvið viðkomandi útbúgving og royndir á hesum fakøkinum, t.d. HH, merkonom, HD ella javnbjóðis útbúgving
- Áhuga fyri fíggjarstýring og fyrisiting
- Fyrikomandi og góð samstarvsevnir
- Evnir at kunna arbeiða sjálvstøðugt, og eisini í bólkum

Vit bjóða
- Eitt starv har tú sjálv/sjálvur kanst verða við til at skapa starvið
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við samskifti úteftir
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið verður á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við starvsfólkunum í Mentamálaráðnum og stovnum tess.

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um landsstýrismálaráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

Umsókn
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. oktober 2002, kl. 15.00.
Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Bjarna Wilhelm, fyrisitingarleiðara, í Mentamálaráðnum á tlf. 35 50 50.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir - Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild umframt einari fyrisitingardeild.
Í **Fyrisitingardeildini** eru 12 starvsfólk, har er lønarstova, prógvstova, móttøka, skjalagreiðsla og húsavørður umframt ein komandi bókhaldsstova. Fyrisitingardeildin er skipað við einum fyrisitingarleiðara, ið vísir til aðalstjóran.

Timburarbeiði

Alt vanligt timburarbeiði verður gjørt.

Tlf. 311057 / 264694

Altjóða Giktadagur í Norðurlandahúsinum

Fyrilestur um Fibromyalgi við norska læknanum Karin Øien Fortseth verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum leygardagin 12.oktober kl 15.oo.
Eftir fyrilesturin verður høvi at seta fram spurningar.

Fibromyalgibólkurin

Ivan Johansen Bilar

Fólk søkist til goymsluna m/k

at byrja 1. november ella skjótast tilber. Koyrikort til persónbil krevst.

Ivan Johansen Bilar
Tlf. 313666
Att.: Jógvan

ER BILURIN

skitin
mattur
keðiligur

Fá hann sum nýggjan

Vit: *vaska *slípa *polera *forsegla

UTTAN OG INNAN

Vit viðgerða eisini stórar bilar og bussar

Ring og hoyr nærri !!

Føroya Bilshine
Bakkavegur 6
FO-625 Glyvrar
Tlf. 448934 · 228934